# Rakstrarleiðari á Statoil

**Til rakstrardeild okkara søkja vit eftir leiðara**

**Starvið**
Sum rakstrarleiðari fært tú dagligu ábyrgdina av øllum rakstrinum hjá Statoil Føroyar. Starvið umfatar handfaring av oljuúrdráttum, tað verið seg móttøku, goymslu og víðari flutning til brúkaran.
Eisini umfatar starvið menning av deildini, soleiðis at brúkarin fær bestu tænastu skipa eftir dagførdum mannagongdum.

**Høvuðsuppgávur**
- At skipa flutningin av oljuúrdráttum til viðskiftafólk okkara.
- At verða dagligur leiðari hjá starvsfólkum okkara á rakstrardeildini.
- At leggja til rættis innkeyp av oljuúrdráttum herundir avgreiðslu av tangaskipum.
- At samskipa arbeiði á goymslum okkara.
- At gera mánaðaruppgerðir á goymslum okkara.
- At hava ábyrgdina av útreiðsluætlanum hjá rakstradeildini.
- At hava ábyrgdina av, at allar ásettar rakstar-, trygdar- og umhvørvisskipanir verða fylgdar.
- At útbúgva starvsfólk og menna verandi skipanir.

**Vit bjóða**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning.
Møguleikar eru eisini at dagføra royndir á rakstrarstøðum hjá Statoil uttanfyri Føroyar og at luttaka á skeiðum innan samtakið.

**Førleiki**
Nýggi rakstrarleiðarin skal verða ágrýtin, framtakshugaður og duga væl at samstarva við viðskiftafólk og starvsfelagar.
Royndir sum leiðari, at nýta teldu og at handfara oljuúrdráttir geva fyrimun.

**Setunarviðurskiftir**
Rakstrarleiðarin er partur av leiðarabólkinum og hevur beinleiðis tilvísing til leiðslu felagsins.

Lønin verður sett eftir útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**P/f Statoil Føroyar,**
**att. Niels Juel Nattestad,**
**Postboks 3098, Viðarnes,**
**FO-110 Tórshavn, innan 21. febr.**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Endamálið hjá Statoil Føroyar er at veita brúkarum kring landið oljuúrdráttir og aðrar vørur. Fyri Statoil Føroyar arbeiða uml. 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu. Umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eisini eitt av okkara fremstu málum.*

**STATOIL**
*- fyri viðskiftafólk okkara*

---

**KEYP SUMMAR-DEKKINI NÚ**



**4 stk. alufelgur 7x15" 4x100**
**4 dekk 195.50x15**
Prísur 5.900.-
Kunnu nýtast til t.d. Toyota, Opel, VW og aðrar.

**BBR-Service**
*620 Runavík • Tel. 44 91 11*

**P/f Esmar Simonsen**
Kambsdalur
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29
E-mail: es@es.fo

Sosialurin - 311820

---

## Landssjúkrahúsið
FO-100 Tórshavn

### Sjúkrasystir til D5

Á psyk. deild á Landssjúkrahúsinum verður eitt avloysarastarv, fyri sjúkrasystir í barnsburðarfarloyvi á 0,8 í skiftandi vaktum, leyst frá 13. apríl 2000 til og við 30. september 2000.

Løn- og setunartreytir eru sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Liss Jacobsen, deildarsjúkrasystir tlf. 313540 lok. 425.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi skal sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**FO-100 Tórshavn**

Umsóknarfreist: 9. mars 2000, kl. 14.00.

---

## 32 tons útróðrarbátur

sum hevur snelluloyvið í Íslandi og fiskidagar í bólki 4a, til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 214949 ella 288473**

---

## Skúlin við Ósánna

Fyri lærarar í farloyvi verður søkt eftir lærarum:

Eitt starv frá 8. mars 2000 til 30. juni 2000 og eitt starv frá 20. mars 2000 til 30. juni 2000.

Bæði størvini hava fult vikutímatal.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. februar 2000.

**Klaksvíkar Skúlanevnd**
**V/ Ingun Joensen, form.**
**700 Klaksvík**

---

## Timburmenn søkjast

Søkt verður eftir timburmonnum at arbeiða á Sjællandi (Hillerød) at byrja sum skjótast. Løn eftir avtalu.

Ring tlf. 0045 23443308
ella tlf. 0045 40721531

**Sp/f KJ-húsasmíð**

---

## Útsettur aðalfundur

Ársaðalfundur felagsins, ið varð lýstur at verða leygardagin 26. feburar, verður ístaðin leygardagin 11. mars.

Tíð, stað og nágreinlig skrá verða lýst seinni. Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum, kunnu senda hesi inn í seinasta lagi týsdagin 29. feburar.

Valevni til formann felagsins eru:
Vígdis Johannesen
Ethel Mortensen

**Havnar Arbeiðskvinnufelag**

---

**www.sosialurin.fo**



FØROYA PEDAGOG FELAG

## Aðalfundurin í Føroya Pedagogfelag útsettur

Aðalfundurin, sum lýstur var at verða

**leygardagin 19. februar 2000**

er útsettur í nakrar vikur.

Lýst verður nærri nær aðalfundurin verður.

**Nevndin**

---

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til

## Umboðsmannaval

**Í sjúkrakassanum fyri Skála Læknadømi tann 18. mars 2000.**

2 umboð fyri Skála kommunu og 1 umboð fyri Elduvíkar kommunu skulu verða vald.

Uppskot við minst 6 valevnum skulu vera Sjúkrakassanum í hendi innan 12. mars.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur • telefon 449212

---

## Varðaleiðari

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, er eitt tænastumannastarv sum varaleiðari leyst at søkja frá 1. apríl 2000 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sett eftir sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 19 + viðbót.

Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja starvið.

Bústovnurin og Sambýlið á Rúnarvegi er heim hjá 12 fólkum við ymiskum tørvi á hjálp og vegleiðing.

Tað verður væntað av varaleiðaranum , at viðkomandi kann skapa trivna, kann átaka sær nýggjar pedagogiskar avbjóðingar, kann samstarva, hevur hugflog, kann seta greiðar linjur og er førur fyri at yvirtaka uppgávur fyristøðufólksins, tá hesin er burturstaddur.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðufólkið á tlf. 448424.

Skrivlig umsókn við prógvi, viðmæli v.m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. februar 2000 og skal sendast til:

**Bústovnurin**
Rúnarvegur
Att.: Fyristøðufólkið
FO-620 Runavík

---

# RIMMAR TILBOÐ

**í Lágpríshandlinum úti á LANDAVEGNUM**

| | |
|---|---|
| **Seyðarhøvd** 1 fyri **24,95** | **Karat kaffi** 500 gr. **19,95** |
| **Ísl. lambstjógv** fyri kg. **59,95** | **Íslendsk egg** 10 stk. **9,95** |
| **Ísl. lambsbógvur** fyri kg. **29,95** | **Super hveitimjøl** 2 kg. **6,95** |
| **Lættsaltað lambskjøt** fyri kg. **39,95** | **Íslagkøka 2000** 1 fyri **59,95** |
| **Høsnarungar** 1.100 gr. 5 fyri **100,00** | **Melis** 2 kg. **7,95** |

Opið er soleiðis:
Mánad-hósd. kl. 09.00-18.30
Fríggjad........ kl. 09.00-19.00
Leygard........ kl. 09.00-14.00

Lágprísir hjá **ELI** við Landavegin
Tel. 31 37 31

Sosialurin - 311820

**Tilboð galdandi frá 10/2 til og við 19/2 2000**

---

## Føroya Psoriasisfelag

Kunngjørt verður við hesum, at næsti viðgerðartúrur fyri psoriasis verður 24. apríl til 19. mai til Bláa Lónið í Íslandi. Tey ið hava tørv á viðgerð, kunnu fara til egnan kommunulæknan. Umsóknir skulu vera húðlæknanum í hendi seinast 1. mars.

**Føroya Psoriasisfelag**

---

## FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT

**SAFARI TRANSPORT**

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR

**Tlf. 31 22 22**